# Til læraran




Rithøvundur: Silja Aldudóttir

Bókadeild Føroya Lærarafelags 2022

Nám: Asta Wolles, Gunvá Magnussen, Henny Dánialsdóttir og Lis G. í Jákupsstovu

## Um bókina

*Ódjór* er um 13 ára gomlu Astu, sum býr í Havn. Asta er nógv einsamøll og hevur tað ikki altíð so gott saman við floksfeløgunum. Astu dámar væl at lesa og at ganga í viðarlundini. Í viðarlundini hittir hon eisini fyrstu ferð Lóu, sum hon gerst vinkona við. Tað hendir ymiskt undarligt í Havn, kloakkirnar flóta yvir, rottur síggjast ymsa staðni, og undarligar ristingar eru í býnum. Eingin veit, hví hetta hendir, og í býráðnum eru tey mest upptikin av, at áin skal latast upp.

Asta hugsar um alt hetta, men veit heldur ikki, hví so er. Av tilvild finnur hon útav, hvat tað er, sum ávirkar býin, og setir sær fyri at gera nakað við tað.

Silja Aldudóttir hevur skrivað spennandi bókina *Ódjór,* og Bárður Dal Christiansen hevur teknað. Bókadeild Føroya Lærarafelags gav bókina út í 2022.

Uppgávurnar eru ætlaðar 5.-7. flokki.

Gott hugskot er at hava eitt hefti at skriva í. Næmingarnir kunnu eisini gera eina mappu á telduni.

## Uppgávur og arbeiðsgongd

Uppgávurnar eru gjørdar eftir leistinum *áðrenn tú lesur*, *meðan tú lesur* og *tá ið tú hevur lisið*. Talan er bæði um einstaklinga- og bólkauppgávur.

Bókin er í 19 pørtum. Partarnir eru bólkaðir alt eftir, hvat hendir í teimum.

## Áðrenn tú lesur

Hyggið at permuni, hvør hevur skrivað bókina?

Hvat fert tú at hugsa um, tá ið tú sært permuna?

Les tekstin á baksíðuni og hygg at myndini.

Hvat væntar tú, at bókin er um?

## Meðan tú lesur

Partarnir í bókini eita bert fyrsti, annar, triði o.s.v. tó undantikið seinasti partur, sum eitur *Oroborus*.

Gev pørtunum hóskandi heiti, so hvørt tú lesur teir.

Eitt hugskot er at skriva heitini sum setningar. Setningarnir kunnu eisini brúkast til eina aftursøgn.

### Støð

Asta er ymsa staðni í Havnini. Skriva øll støðini niður, so hvørt sum tú lesur um tey. Til ber at finna støðini á netinum.



©Nám

**Partarnir**

Partarnir eru býttir upp eftir evnum og søgugongd. Vit hava skrivað nøkur vegleiðandi punkt til partarnar.

Í fyrsti og øðrum parti lesa vit um Astu, og um at rottur eru í býnum.

- Undanvitan
- Happing
- Asta er nokk so einsamøll
- Astu dámar at lesa
- Rottur eru í býnum
- Okkurt óunniligt, møguliga samband við heitið á bókini

Tosið saman um, hvat hendir í fyrsta og øðrum parti.

Í triðja og fjórða parti fáa vit meira at vita um Astu. Her eru nógv sáðkorn. Hygg í *Nem í fimta*, s. 38 og 74.

- Asta og familjan
- Marran
- Okkurt er hent
- Uni, tey hava verið vinir
- Møtir Lóu fyrstu ferð
- Tosar við Lóu
- Lóa og Asta hittast aftur
- Okkurt er galið við kloakkunum
- Ristingar í býnum

Lýs Astu. Skriva eina stutta lýsing.

Í fimta, sætta og sjeynda parti er meira um Astu og Lóu og teirra vinalag.

- Vinalagið hjá Astu og Lóu
- Asta og Uni hava verið vinir
- Asta fortelur, at hon fírdi Kristinu, og hví
- Húsið í trænum, Asta og Marianna
- Asta tolir ikki, at Lóa og Marianna eru vinkonur
- Asta kann blíva í øðini
- Pápin er politikari
- Pápin veit, at okkurt er galið við ánni/kloakkunum

Asta kann blíva í øðini. Tosið saman í smærri bólkum um, hvat ger Astu í øðini og hví? Skrivið stikkorð.

Í holuni í trænum spæla genturnar tónleik, her er upplagt at gera ein playlista. Tosið um, hvørji løg kunnu brúkast, t.d. kann playlistin spælast, tá ið myndirnar við bókbento eru hongdar upp.



©Nám

- Playlisti hjá Astu
    - Ger ein playlista við fimm løgum, sum tú heldur hóska til Astu.
    - Tosið um, hví júst hesi løgini eru vald.
    - Gerið ein felags playlista við øllum løgunum, sum tit hava valt.

Í áttanda, níggjunda, tíggjunda og ellinta parti er nógv um ormin.

- Asta fer í ánna og sær eyguni í orminum
- Asta biður um umbering
- Asta sigur Lóu frá, hvat hon sá innan fyri rimarnar
- Asta og Lóa fara inn um rimarnar
- Asta hittir ormin fyrstu ferð

Asta skrivar dagbók, hvat skrivar hon um náttina í viðarlundini?

Næmingarnir kunnu skriva stutta dagbók tvær ella tríggjar ferðir, meðan arbeitt verður við bókini.

Tólvti, trettandi, fjúrtandi, fimtandi og sekstandi partur snúgva seg nógv um ormin.

- Asta og Lóa vitja ofta ormin
- Asta fer eisini ofta einsamøll, tað dámar henni væl
- Asta gevur orminum fisk at eta
- Ormurin er skaddur
- Asta dugir at síggja, at tað er ikki gott fyri ormin at vera í ánni
- Asta og Lóa fara at kanna, hvussu tær kunnu hjálpa honum út
- Vitja á býarsavninum
- Siga Una frá um ormin
- Leggja ætlanir um at hjálpa orminum út.

Skrivið ein samandrátt av tí, sum tit vita um ormin.

Í seytjanda og átjanda parti verður sagt frá um ferðina hjá orminum út úr tunlinum.

- Asta og ormurin eru inni í tunlinum
- Uni og Lóa hava tikið rimar burtur, so ormurin kann sleppa út
- Spreingingar og aðrar rimar gera, at tað er trupult hjá Astu og orminum at sleppa út.
- Ormurin vil sleppa út
- Ormurin leggur nógv fyri og sleppur út
- Asta fær skaða
- Ormurin er skaddur
- Doyr ormurin?

Skrivið bjargingarætlanina í tíðarrøð, so at hon lýsir, hvat Asta, Lóa og Uni hvør í sínum lagi skulu gera.


©Nám

*Oroborus* er seinasti partur, og tann einasti, sum hevur eitt heiti. Oroborus er ein gátuför slanga, sum bítur seg í halan.

- Nógv miðling um, hvat hendi
- Fólk siga seg hava sæð ymiskt
- Stórur skaði, men eingin doyði
- Kommunan umber við skeivari løðing
- Asta endar á sjúkrahúsinum, brotnan arm og krím
- Vil ikki fortelja teimum vaksnu nakað
- Asta og Uni góðir vinir aftur
- Ormurin deyður?
- Lóa byrjar í flokkinum

Farið á netið at leita eftir, hvat oroborus merkir. Prátið um, hví parturin man eita soleiðis.

## Tá ið tú hevur lisið

**Bókbento**

Næmingarnir gera bókbento, antin í bólki ella hvør sær.

Bento er eitt japanskt orð. Tað er ein mateskja, sum er býtt sundur í smærri kassar, so at maturin í eskjuni ikki verður blandaður saman.

Ein bókbento er ein mynd, har bókin liggur á einum fýrkanti, rundan um verða lagdir lutir, sum lýsa, hvat bókin er um. Ein bókbento er ein tulking, tí kunnu myndirnar vera ymiskar.

Vegleiðing til bókbento er á snar.fo sum pdf.

**Vinir mínir**

Næmingarnir skriva í vinabók. Tey skriva, sum um tey eru Asta, Lóa ella Uni. Okkurt fáa tey at vita í *Ódjór*, annað mugu tey ímynda sær út frá tí, tey vita um persónarnar.

Næmingarnir fylla arkið út hvør sær. Tá ið tað er gjørt, kunnu tey fara í bólkar og samanbera tað, sum tey hava skrivað.

Sama hugskot kann nýtast at gera eina floksvinabók.



©Nám

# Andlitsmynd



Bárður Dal Christiansen hevur myndprýtt bókina við linoliumsskurðum. Tað ber væl til at endurskapa líknandi myndir við svartari tussj.

**Tú skalt brúka**

- Eina andlitsmynd av tær
- Hvítt, tjúkt kopipappír
- Blýant og viskileður
- Svarta tussj
- Svarta tussj við tunnari stift (fineliner)

**Mannagongd**

1) Tak eina andlitsmynd.
2) Ger hana svart/hvíta.
3) Lat myndina upp í word.
4) Set bæði kontrastina og ljósstyrkina heilt niður, so tú akkurát hómar andlitsdrøgini.



5) Tá ið tú hevur gjørt myndina heilt ljósa, gert tú hana størri, so hon fyllir eitt A4-ark.
6) Prenta myndina á pappír, sum er eitt sindur tjykkri enn vanligt kopipappír.



©Nám



7) Tekna linjurnar leysliga við blýanti. Fylg tínum vanligu andlitsdrøgum og brúka myndina hjá Bárði til íblástur. Legg til merkis, at tað er longri ímillum linjurnar, har ljósið kemur á, t.d. á pannuni og um kjálkarnar.



8) Tekna nú linjurnar við tunnu tussjini og fyll síðan tað út við svartari tussj, sum manglar.




9) Ger strikurnar tjykkri og tjykkri, til tú heldur myndina vera lidna.



©Nám

## Svørt/hvít mynd

Tá ið arbeitt verður við linolium, er umráðandi at gera sær greitt, hvat skal skerast út, og hvat skal vera verandi á myndini. Tað, tú skert út, verður hvítt á lidna prentinum. Myndin broytist sera nógv, alt eftir hvat verður skorið út.

Myndirnar niðanfyri vísa ymiskan útskurð.





Hvørja mynd dámar tær betur? Gev tær far um, hvussu eyguni festa seg ávikavist á myrku ella ljósu myndina. Hví man so vera?

Hetta kann eisini gerast við svørtum og hvítum pappíri.

**Tú skalt brúka**

- Svart pappír
- Hvítt pappír
- Saks
- Hobbyknív
- Lím

**Mannagongd**

1. Teknað eitt skrímsl í A4 støðd. Tú kanst brúka ódjórið sum íblástur.
2. Klipp/sker skrímslið út.
3. Tað, sum tú klippir burtur úr hvíta pappírinum, skalt tú líma á svarta pappírið.
4. Og umvent, tað sum tú klippir burtur úr svarta pappírinum, skalt tú líma á hvíta pappírið.
5. Tú hevur nú tvey eins skrímsl, men tey eru tó sera ólík.
6. Hvørja mynd metir tú vera meira ræðandi? Hví man so vera?



©Nám

**Myndirnar í bókini**

Vilja tit arbeiða meira við myndunum í bókini, finnast tær á hesum síðum.

1. partur, á bókasavninum s. 5
2. partur, mynd av rottum s. 8
3. partur, ein mynd, borð, víngløs, trø og fuglar s. 15
4. partur, eingin mynd
5. partur, mynd av læraranum og talvuni s. 35
6. partur, mynd av Astu og Lóu s. 42
7. partur, andlit inni í gapinum á ódjórinum s. 49
8. partur, eingin mynd
9. partur, mynd, tenn s. 61
10. partur, eingin mynd
11. partur, mynd, Asta og tenn 80-81
12. partur, mynd, Asta og ódjórið s. 91
13. partur, eingin mynd
14. partur, mynd, ormurin, stavur og ein hond s. 117
15. partur, eingin mynd
16. partur, Rasmus Effersøe og ormurin s. 137
17. partur, mynd, svørt bakgrund, ormurin, áin og rimarnar s. 142
18. partur, mynd, Asta og ormurin s. 149

*Oroborus*, ein mynd, ein hond og høvdið á orminum s. 152



©Nám